**Til sølu**

**BMW 320i**

*149 HK - Árg. 1994*

*Sera væl viðfarin*

*Fígging kann útvegast*

**Bilfríðkan**

Velbastaðvegur
110 Tórshavn
Tlf. 317300 - 217300

FIAT

**EPSON blekkprintari**



**Stylus Color 900**

1440*720dpi A4-litprintari, max. 12 síður um min við drivarum, blekkpatronum og parallelkaðali

Kostnaðarprísur kr. 5.490,-

SpF Teldu Tænastan
Tlf.: 317620 • Fax: 317699

**PRENT?**

...nýggjasta tøknin og gott handverk geva besta úrslitið...

Spf. HESTPRENT
Dvørgastígur 7 • 100 Tórshavn
Tlf. 31 45 55 • Fax 31 80 26
e-mail: hestoy@hestprent.fo

Eg átaki mær alt arbeiði innan

**RØR og SANITET**

Tilboð útvegast



Hans Jacob á Lava
í Lágni 18
FO-100 Tórshavn
Tlf. 31 47 97 – 21 47 97

**Føst ogn til sølu**

Fasta ognin R.C. Effersoesgøta nr. 38 er til sølu. Ognin er 2.055 m² til støddar við ábygdum sethúsum, drívhúsum og einum gróthúsi.

Boð undir 2.500.000 kr. hava ongan áhuga.

Áhugaði kunnu venda sær til undirritaða

**Kári Dalsgaard Petersen**, adv.
Álvastígur 11
Postboks 89
100 Tórshavn
Tlf. 311066
Fax. 310703

E-mail: adv-kdp@post.olivant.fo

## Fíggjarleiðari til ALS

Starvið sum deildarleiðari á Fíggjardeildini hjá ALS er leyst at søkja

Høvuðsuppgávan hjá fíggjarleiðaranum er at standa fyri, menna og skipa fíggjarligu stýringini hjá ALS og í hesum sambandi m.a.:

- at standa fyri dagligu roknskaparføringini og deildarrokskapunum
- at gera roknskap fyri stovnin, bæði leypandi roknskapir og ársroknskapin
- at gera rakstrar- og gjaldførisætlanir í samstarvi við hinar deildirnar á ALS
- at umsita fíggjarligu ognirnar hjá ALS
- at umsita inngjaldið til stovnin
- at standa fyri útgjaldinum av arbeiðsloysisstuðli.

Og annars at leiða og skipa dagliga arbeiðið á Fíggjardeildini, sum hevur 4 starvsfólk.

Talan er um eitt avbjóðandi og krevjandi starv, sum krevur haldgóða útbúgving og góðar starvsroyndir.

Tað er av størsta týdningi, at uppgávurnar hjá Fíggjardeildini verða røktar til litar, og tí er neyðugt, at fíggjarleiðarin hevur:

- góðan førleika til sjálvstøðugt at leiða og skipa dagliga arbeiðið á Fíggjardeildini
- dyggan vilja til, við samstarvi og virkisfýsni, at menna fíggjarligu stýringina hjá ALS, og í hesum sambandi røkka ítøkilig úrslit.

ALS stendur støðugt fyri broyttum arbeiðsfortreytum. Í hesum sambandi er neyðugt, at fíggjarleiðarin hevur evnir at tillaga seg broytingum í arbeiðsumstøðunum.

Fíggjarleiðarin myndar, saman við hinum deildarleiðarunum á ALS og stjóranum, dagligu leiðsluna á stovninum. Fíggjarleiðarin hevur beinleiðis tilvísing til stjóran. Løn sambært avtalu

Starvið verður sett sum skjótast. Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal verða stovninum í hendi í seinasta lagi mánadagin 30. august á middegi.

Umsóknir skulu stílast til Allan Skaalum, stjóra á ALS, sum kann geva nærri frágreiðing um starvið á telefon 318396, lokal 137.

*ALS hevur til endamáls at veita fíggjarligan stuðul til arbeiðsleys, at virka fyri bøttum møguleikum hjá arbeiðsleysum at fáa arbeiði og at umsita arbeiðsávísing fyri føroyska arbeiðsmarknaðin. Á ALS starvast í løtuni 21 fólk. Virksemið hjá ALS er í høvuðsheitum lógarásett. Ovastu leiðsluna hevur stýrið fyri ALS, sum - eftir tilmæli frá arbeiðsgevara- og løntakarafeløgunum á arbeiðsmarknaðinum - verður valt av Føroya Landsstýri.*

ALS

Arbeiðsloysisskipanin
P.O Box 3022 • FO-110 Tórshavn
Tel 319550 • Fax 310263
e-mail: als@als.fo



# Fegnast um oljuvinnuráðið

*Jógvan Krosslá, býráðsformaður í Vági, fegnast um, at syðra helvt av oynni nú er komin við í oljuvinnuráðið.*

JOHN JOHANNESSEN

– Tað er ógvuliga gott fyri alla vinnuna í Suðuroynni, at vit nú hava fingið eitt oljuvinnuráð, ið fevnir um alt vinnulívið í oynni. Tað hevur nevniliga alstóran týdning, at øll oyggin er savnað, tá tosað verður um eina komandi oljuvinnu.

Jógvan Krosslá heldur tað vera alneyðugt við tøttum samstarvi millum syðru og norðaru hálvu av oynni, um oljuvinna gerst aktuell. Og heldur hann Suðuroyar Oljuvinnuráð vera eitt gott og avgerandi stig á leiðini, hóast hann sigur, at hetta ikki skal blandast saman við øðrum ætlanum innan eina komandi oljuvinnu.

– Tað, at oljuvinnuráðið nú fevnir um alla oynna, merkir ikki, at vit fara at broyta ætlanirnar hjá kommununi. Vit fara framhaldadi at vísa gestum úr oljuvinnuni á økið á Oyrunum, ið er okkara uppskot til eina oljuvinnuhavn, sigur býráðsformaðurin í Vági. Hann ynskir tó at leggja dent á, at neyðugt er við einum tøttum samstarvi millum kommunurnar í oynni, tá tosað verður um oljuvinnu. Tó sigur hann, at hetta ikki skal skiljast soleiðis, at neyðugt er at leggja alla oynna saman í eina kommunu. Hetta heldur hann vera óneyðugt, tí væl ber til at neyvt samstarv innan ávíst øki, uttan at kommunurnar tó skulu vera heilt tætt knýttar.

Jógvan Krosslá hevur annars ikki stórvegis viðmerkingar, men vísir á, at Suðuroyar Oljuvinnuráð er eitt stig á leiðini til eitt neyvt samstarv innan vinnuna í oynni.